LÍVSVERK
EFTIRLØNARGRUNNUR LØNTAKARANNA

# Eftirlønargrunnur Løntakaranna
# (Lívsverk)

Skrás. nr. 3566

## Ársfrásøgn 2023

**Frumrit**

Góðkend á aðalfundi tann 20.03.2024

Páll Nielsen
Fundarstjóri

# Innihaldsyvirlit


| | Síða |
|---|---|
| Upplýsingar um grunnin | 2 |
| Frágreiðing til ársfrásøgnina fyri 2023 | 4 |
| Seinastu 5 árini | 8 |
| Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn | 9 |
| Roknskaparátekning | 10 |
| Váttan frá óheftum grannskoðara | 11 |
| Rakstrarroknskapur | 17 |
| Fíggjarstøða | 18 |
| Fíggjarstøða | 19 |
| Frágreiðing um eginogn | 20 |
| Notur | 21 |

# Upplýsingar um grunnin

## Navn, bústaður v.m.

- Eftirlønargrunnur Løntakaranna
- Skrásetingar nr. 3566
- Stoffalág 17
- 100 Tórshavn
- Heimstaðarkommuna: Tórshavn

## Leiðslubygnaður

**Nevnd:**

- Georg F. Hansen, formaður
- Eyðbjørn M. Larsen, næstformaður
- Hans Jacob Joensen
- Páll Nielsen
- Sonja Jógvansdóttir
- Sunniva Sólarris
- Sunrid Vang

**Stjórn:**

- Elin Sørensen

**Grannskoðanarbólkur:**

- Georg F. Hansen, formaður
- Eyðbjørn M. Larsen
- Hans Jacob Joensen
- Páll Nielsen
- Sonja Jógvansdóttir
- Sunniva Sólarris
- Sunrid Vang

## Grannskoðan og aktuarur

Grannskoðan:

- P/F Januar
  løggilt grannskoðanarvirki

Aktuarur:

- Steen Ragn
  Ábyrgdarhavandi aktuarur

# Frágreiðing til ársfrásøgnina fyri 2023

## Endamál grunsins

Endamál grunsins er at reka eftirlønarvirksemi. Endamálið við hesum virksemi er at veita limunum eftirløn, tá limirnir gevast at arbeiða vegna aldur.

## Úrslitið fyri 2023

**Eftirlønarvirkskemi**

Bæði inngjøld og útgjøld eru hækkað nakað í mun til árið fyri, og er hetta ein gongd, sum hevur verið seinastu árini, og sum kann væntast komandi ár.

**Íløguvirksemi**

2023 byrjaði rímiliga væl og eftir ræðsluárið 2022, sum í stóran mun snúði seg um bardagan móti ovurhonds inflatión, sóust nú tekin um, at inflatiónin var lækkandi. Í bardaganum móti inflatiónini, høvdu miðbankarnir báðumegin Atlantshavið hækkað leiðandi renturnar munandi. Tá 2023 byrjaði, hevði amerikanski miðbankin, Fed, hækkað rentuna úr 0,25% í 4,50%, meðan evropiski miðbankin, ECB, hevði hækkað rentuna úr -0,50% í 2,00%.

Tað vísti seg, at eisini 2023 í stóran mun snúði seg um inflatiónsbardagan og pengapolitikkin hjá miðbankunum.

Ógvisliga tálmandi pengapolitikkurin, ið varð neyðugur fyri at basa inflatiónini, førdi við sær ein ótta um, at heimsbúskapurin kundi enda í búskaparligari resessión. Við ársbyrjan vístu tøl, at Evruland var í vakstrartrupulleikum, men samstundis var arbeiðsloysið á søguliga lágum stigi. Tískil var væntað, at resessiónin í Evropa ikki beit seg fasta og tí ikki gjørdist drúgv.

Búskapargongdin í USA var betri enn í Evropa, men um várið komu aftur avbjóðingar, tá Silicon Valley Bank kom í trupulleikar og at enda fór av knóranum. Aðrir bankar vóru somuleiðis í stórum trupulleikum, men Fed gjørdi skjótt av og sendi eina hjálpandi hond til fíggjarvinnuna. Í Evropa vóru eisini trupulleikar í bankavinnuni. Her hendi tað, at stóri bankin Credit Suisse fór av knóranum.

Hóast myndugleikarnir settu tiltøk í verk, fyri at basa óttanum um bankavinnuna, kom ávísur skelkur tó á fíggjarmarknaðirnar. Spurningurin var, um avbjóðingarnar í bankavinnuni, og harvið lækkaði hugurin at veita kredittir, fór at tálma búskapargongdini somikið, at ein resessión aftur kundi gerast veruleiki.

Miðbankarnir hildu kortini fram at hækka leiðandi renturnar, og um miðan apríl var amerikanska rentan komin upp á 5,00%, og tann í Evropa var komin upp á 3,00%.

Tálmandi pengapolitikkurin, hvørs endamál var at basa inflatiónini, tóktist at virka, tí inflatiónin var komin væl niður av hægstu stigum. Amerikanska inflatiónin var nú komin niður á 5,0%, og evropiska inflatiónin var komin niður á 6,9%. Tá inflatiónin var hægst, var hon 9,1% í USA og 10,6% í Evrulandi.

Inflatiónin var framvegis ov høg, sammett við málið á 2,0%. Tí framdi Fed ta 10. rentuhækkingina á rað tíðliga í apríl. Tá var leiðandi amerikanska rentan hækkað upp í 5,25%, ið var hægsta stigið síðani 2007. Rentuhækkingarskeiðið var samstundis tað ógvusligasta í 40 ár. Í Evropa var rentan eisini hækkað meira, og tá rentan náddi 3,25% í mai, var hetta hægsta renta í Evropa síðani 2008.

Virðisbrøvini vóru merkt av inflatiónsgongdini, tálmandi pengapolitikkinum og ófriðinum í bankavinnuni. Rentan á lánsbrøvum var á lutfalsliga høgum stigi, og nú tað var ósannlíkt, at búskaparvøksturin fekk stórvegis skaða av pengapolitikkinum og ófriðinum í bankavinnuni, stóðu partabrøvini seg eisini nøktandi.

Tá komið var út í heystið 2023, sóust sera góð tøl um amerikanska búskapin. Vøksturin hevði tikið dik á seg, og privata nýtslan og íløguhugurin vóru á høgum stigi. Hetta førdi tó ótta við sær um, at enn fleiri rentuhækkingar fóru at koma frá miðbankunum. Óttin vardi tó ikki leingi, tí tá veturin nærkaðist, var amerikanska resessiónin avlýst.

Sera góður búskaparvøkstur fyri 3. ársfjórðing var kunngjørdur, og inflatiónstølini í USA og Evrulandi hildu á at lækka. Amerikanska inflatiónin var nú komin niður á 3,7%, og tann í Evrulandi var komin niður á 2,9%.

Leiðandi rentan í USA var nú komin upp á 5,50%, og tann evropiska rentan var á 4,00%. Amerikanska rentan var nú hækkað 11 ferð síðani mars 2022 og var á hægsta stigi síðani 2001. Eisini evropiska rentan var á hægsta stigi síðani 2001.

Eftir tær seinastu rentuhækkingarnar var nú lítið sannlíkt, at fleiri rentuhækkingar komu, og tá stjórin í Fed gav ábendingar um hetta, gjørdist hýrurin sera jaligur á fíggjarmarknaðunum. Lánsbrævarenturnar lækkaðu munandi, og partabrøvini hækkaðu. Í novembur sóu vit ein tann besta virðisbrævamánaðin í longri tíð.

Eitt baldrut ár, har serliga tálmandi pengapolitikkur og gongdin í inflatiónini høvdu verið í andglettinum, endaði sera væl. 4. ársfjórðingur gjørdist sera góður, hvat virðisbrævavinningi viðvíkur.

Íløgan við lága váðanum endaði soleiðis árið við einum samlaðum vinningi upp á 6,25%, meðan íløgan við høga váðanum endaði árið við einum samlaðum vinningi upp á 14,08%. Samanumtikið eitt gott ár.

**Staðfest úrslit**

Nevndin hevur valt at knýta eginognina at íløgupuljuni við lágum váða, sum hevði eitt avlop upp á 3,25% fyri árið.

Staðfesta úrslitið hjá Lívsverk fyri árið og býtið av hesum kann útgreinast soleiðis:

| | 2023 | 2022 |
|---|---|---|
| | t.DKK | t.DKK |
| Fíggjaravkast | 126.029 | -194.490 |
| Umsiting o.a. postar | -5.745 | -4.973 |
| **Úrslit áðrenn býti** | **120.284** | **-199.463** |
| | | |
| Fíggjaravkast til limir | 124.243 | -191.206 |
| Umsitingargjald limir | -5.745 | -4.973 |
| Váðainntøkur/-útreiðslur | 48 | -262 |
| **Tilskrivað limum í alt** | **118.546** | **-196.441** |
| Aðrar inntøkur/útreiðslur | 0 | 0 |
| Váðainntøkur/-útreiðslur | -48 | 262 |
| Fíggjaravlop til eginogn | 1.787 | -3.284 |
| **Tilskrivað eginognini í alt** | **1.739** | **-3.022** |
| **Býtt úrslit** | **120.284** | **-199.463** |

Samanumtikið verður úrslitið mett at vera nøktandi.

## Kapitalstyrki

Grunnurin er sterkur í mun til sínar tryggingarligu skyldur.

| | 31.12.2023 | 31.12.2022 |
|---|---|---|
| | t.DKK | t.DKK |
| Eginogn | 31.456 | 29.717 |
| Limakontur | 97.357 | 86.697 |
| **Kjarnufæfeingi** | **128.813** | **116.414** |
| **Grundarfæfeingi** | **128.813** | **116.414** |
| | | |
| Fæfeingiskrav | 27.591 | 27.515 |
| **Kapitalstyrki** | **101.222** | **88.899** |

Fæfeingiskravið svarar til minstakravið til kapital sambært lóggávuni.

Individuelli solvenstørvur grunsins er uppgjørdur til 27,3 mió.kr. pr. 31.12.2023, sum kann útgreinast soleiðis:

| | |
|---|---|
| Marknaðarváði | 25,9 |
| Operationellur váði | 1,4 |
| Váði tilsamans at dekka | 27,3 |

## Hendingar eftir roknskaparlok

Frá degnum fyri fíggjarstøðuni til í dag er einki hent, sum eftir leiðslunnar áskoðan hevur týðandi ávirkan á ársfrásøgnina.

## Útlit fyri 2024

**Eftirlønarvirkskemi**

Roknað verður við, at inngjøldini halda áfram at hækka, og at útgjøldini somuleiðis koma at hækka.

**Íløguvirksemi**

Hvussu gongdin verður í 2024 er tengt at, um tálmandi pengapolitikkurin megnar at halda inflatiónini niðri á lágum stigi, og um inflatiónin endaliga røkkur málinum upp á 2,0%. Harumframt er viðkomandi, hvussu verður við búskaparliga vøkstrinum.

Væntað verður, at inflatiónin fer at lækka meira og kann nærkast inflatiónsmálinum á 2% móti ársenda 2024. Harumframt verður eisini væntað, at búskaparvøksturin verður á hampiligum stigi. At miðbankarnir væntast at byrja at lækka leiðandi rentuna aftur miðskeiðis í 2024 er eisini stimbrandi fyri fíggjarmarknaðirnar. Samanumtikið eru útlitini fyri 2024 tí hampiliga góð, men ávísir váðar eru kortini. Hvussu verður gongdin við krígnum millum Russland og Ukreina?

Partabrøvini eru lutfalsliga kostnaðarmikil, men góð búskaparlig útlit kunnu stimbra tey meira. Longu lánsbrævarenturnar kunnu eisini lækka saman við inflatiónini, men av tí, at langa rentan longu er lækkað nakað, avmarkar hetta vinningin frá lánsbrøvunum eitt vet. Samanumtikið væntast vinningurin í 2024 at fara liggja á einum miðal stigi.

## Seinastu 5 árini

Niðanfyri eru sett upp tøl úr rakstri og fíggjarstøðu fyri framhaldandi grunnin. Tá tølini verða samanborin eigur at verða havt í huga, at EFA og EHH løgdu saman 1.1.2021, og at tølini fyri árini fram til og við 2020 einans umfatar EFA, sum er framhaldandi grunnur.

Fyri at geva eina mynd av tølunum, sum tey høvdu sæð út, um grunnarnir høvdu verið samanlagdir øll árini í yvirlitinum, er niðast somuleiðis sett upp samanløgd tøl úr rakstrarroknskapi og fíggjarstøðu fyri báðar grunnarnar EFA og EHH. Í hesi uppseting eru tøl fyri 2019-2020 fyri báðar grunnarnar løgd saman fyri at lýsa fíggjarligu gongdina.

| **Høvuðstøl - framhaldandi grunnur (t.DKK)** | **2023** | **2022** | **2021** | **1.1.2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | |
| Eftirlønargjøld | 101.956 | 96.500 | 95.642 | | 52.544 | 49.061 |
| Útgoldnar veitingar | -32.036 | -30.900 | -31.105 | | -18.080 | -17.168 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 126.029 | -194.490 | 90.835 | | 39.719 | 66.183 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -5.745 | -4.973 | -6.390 | | -2.290 | -2.344 |
| Eftirlønartekniskt úrslit | -48 | 262 | -17 | | 0 | 0 |
| Úrslit av rakstri | 1.739 | -3.022 | 994 | | 10.183 | 1.485 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | | |
| Avsetingar til eftirlønarskyldur tilsamans | 1.361.047 | 1.183.242 | 1.303.269 | 1.162.211 | 763.389 | 705.787 |
| Limakontur tilsamans | 97.357 | 86.697 | 97.510 | 89.128 | 68.137 | 64.027 |
| Eginogn tilsamans | 31.456 | 29.717 | 32.739 | 31.865 | 26.897 | 16.833 |
| Aktiv tilsamans | 1.490.780 | 1.299.804 | 1.434.353 | 1.285.622 | 858.423 | 786.714 |

| **Lyklatøl / *Financial ratios*** | **2023** | **2022** | **2021** | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|
| Avkast viðvíkjandi marknaðarrentuproduktum | 9,5% | -13,3% | 7,1% | 4,9% | 9,4% |
| Váði á avkasti viðvíkjandi marknaðarrentueftirlønum | 3,25 | 3,25 | 2,00 | 2,00 | 3,50 |
| Kostnaðir fyri hvønn tryggjaðan | 214 kr. | 187 kr. | 265 kr. | 116 kr. | 120 kr. |
| Kostnaðir í prosent av avsetingum | 0,4% | 0,4% | 0,5% | 0,3% | 0,3% |
| Renting av eginogn eftir skatt | 5,7% | -9,7% | 3,1% | 46,6% | 9,2% |
| Solvensdekningur | 466,9% | 423,1% | 430,1% | 345,3% | 270,6% |

| **Høvuðstøl - EFA + EHH (t.DKK)** | **2023** | **2022** | **2021** | | **2020** | **2019** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapur** | | | | | | |
| Eftirlønargjøld | 101.956 | 96.500 | 95.642 | | 85.910 | 82.155 |
| Útgoldnar veitingar | -32.036 | -30.900 | -31.105 | | -28.369 | -25.094 |
| Úrslit av íløguvirksemi | 126.029 | -194.490 | 90.835 | | 54.291 | 90.434 |
| Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi | -5.745 | -4.973 | -6.390 | | -4.943 | -4.467 |
| Eftirlønartekniskt úrslit | -48 | 262 | -17 | | -32 | -6.413 |
| Úrslit av rakstri | 1.739 | -3.022 | 994 | | 10.151 | -4.498 |
| **Fíggjarstøða** | | | | | | |
| Avsetingar til eftirlønarskyldur tilsamans | 1.361.047 | 1.183.242 | 1.303.269 | 1.162.211 | 1.141.220 | 1.052.092 |
| Limakontur tilsamans | 97.357 | 86.697 | 97.510 | 89.128 | 110.118 | 102.505 |
| Eginogn tilsamans | 31.456 | 29.717 | 32.739 | 31.865 | 26.897 | 16.833 |
| Aktiv tilsamans | 1.490.780 | 1.299.804 | 1.434.353 | 1.285.622 | 1.285.621 | 1.178.671 |

## Leiðslustørv hjá nevnd og stjórn

Upplýsingar um onnur leiðslustørv hjá nevnd og stjórn sambært § 129 a í Kunngerð um ársfrásagnir hjá tryggingarfeløgum og haldfelagsskapum:

Eyðbjørn Larsen, næstformaður:

- Stjóri í Sp/f SÓKN Advokatar, skrás. 6341
- Nevndarlimur í Sp/f Vindrøkt II, skrás 7641
- Nevndarlimur í Sp/f Røkt, skrás 2122
- Nevndarlimur í Sp/f Vindrøkt, skrás 5368

LÍVSVERK
EFTIRLØNARGRUNNUR LØNTAKARANNA

# Roknskaparátekning

Vit leggja við hesum fram Ársfrásøgn fyri grunnin fyri 2023. Ársfrásøgnin er gjørd í samsvari við ásetingarnar í tryggingarlógini.

Tað er okkara fatan, at nýtti roknskaparhátturin er nøktandi, og at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum, fíggjarligu støðuni og av úrslitinum.

Leiðslufrágreiðingin inniheldur eftir okkara áskoðan eina rættvísandi frágreiðing um gongdina í grunninum og um virksemi grunsins og fíggjarviðurskiftini, og eina lýsing av teim týdningarmestu váðunum og óvissu tættunum, sum kunnu koma at ávirka grunnin.

Tórshavn, tann 11. mars 2024

Stjórn:

Elin Sørensen, stjóri

Nevnd:

Georg F. Hansen, form.

Eyðbjørn M. Larsen, næstform.

Hans Jacob Joensen

Páll Nielsen

Sonja Jógvansdóttir

Sunniva Sólarris

Sunrid Vang

# Váttan frá óheftum grannskoðara

**Til eigararnar í Eftirlønargrunni Løntakaranna (Lívsverk)**

## Niðurstøða

Vit hava grannskoðað ársroknskapin hjá Eftirlønargrunni Løntakaranna fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2023 við fíggjarstøðu pr. tann 31. desember 2023, frágreiðing um eginogn, rakstrarroknskapi og notum fyri grunnin, íroknað frágreiðing um nýttan roknskaparhátt.

Tað er okkara fatan, at ársroknskapurin gevur eina rættvísandi mynd av grunsins ognum, skyldum og fíggjarligu støðuni tann 31. desember 2023 og av úrslitinum av virksemi grunsins í roknskaparárinum 1. januar – 31. desember 2023 samsvarandi lóg um tryggingarvirksemi.

Okkara niðurstøða er í samsvari við grannskoðanarprotokollina til nevndina.

## Grundarlag undir niðurstøðuni

Grannskoðanin er løgd til rættis í samsvari við altjóða standardar um grannskoðan (ISA) og aðrar ásetingar, sum eru galdandi í Føroyum. Okkara ábyrgd eftir hesum standardum og ásetingum er nærri greidd frá í niðanfyri standandi broti "Ábyrgd grannskoðarans av at grannskoða ársroknskapin".

## Óheftni

Vit eru óheft av grunninum í samsvari við altjóða reglurnar hjá International Ethics Standards Board for Accountants' um etiskan atburð hjá grannskoðarum (IESBA's Code) og øðrum etiskum krøvum, sum eru galdandi í Føroyum. Vit hava eisini hildið aðrar etiskar skyldur, sum ásettar eru í hesum krøvum í IESBA Code.

Eftir okkara bestu sannføring, hava vit ikki veitt nakrar ikki loyvdar veitingar, sum eru nevndar í grein 5 í Fyriskipan (EU) nr. 537/2014. Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðanarprógv, ið kunnu vera grundalag undir okkara niðurstøðu.

## Tilnevning

P/F Januar var fyrstu ferð valt til grannskoðara á aðalfundi tann 16.03.2013 fyri roknskaparárið 2013. Vit eru endurvald árliga við avgerð frá kapitaleigarunum óavbrotið fyri eitt tíðarskeið á tilsamans 12 ár íroknað roknskaparárið 2023.

**Megingrannskoðanarevni**

Megingrannskoðanarevni eru tey evni, sum eftir okkara fatan vóru mest týðandi í okkara grannskoðan av ársroknskapinum fyri 2023. Hesi evni vóru viðgjørd saman við okkara grannskoðan av ársroknskapinum sum heild, og tá vit gjørdu okkara niðurstøðu um tað, og gera vit tí onga serstaka niðurstøðu viðvíkjandi hesum evnum.

| *Megingrannskoðanarevni* | *Okkara reaktión meðan vit hava grannskoðað* |
|---|---|
| *Virðisáseting av fíggjarligum íløguognum*<br><br>Grunnurin hevur íløguognir upp á tilsamans 1.487 mió. kr., sum er nærum 100% av fíggjarjavnanum tilsamans. Íløguognir umfata íløguognir tengdar at maknaðarrentuproduktum upp á 1.455 mió.kr.<br><br>Virðisásetingin á fíggjarlig amboð skrásett á keypsskála (støði 1) verður gjørd upp við støði í kursinum á keypsskálanum við endan á roknskapardegnum.<br><br>Vit hava lagt dent á virðisásetingina á fíggjarligum amboðum skrásett á keypsskála (íløguognir), av tí at tey eru týðandi í ársroknskapinum.<br><br>Víst verður til ársroknskapin brotið "Íløguognir" í umrøðuni av nýttum roknskaparhátti. | Vit hava mett um váðarnar við tí endamáli at fáa fatan av KT-skipanum, mannagongdum og innan-eftirlitunum viðvíkjandi íløguognunum. Viðvíkjandi innaneftirlitunum mettu vit um, hvørt hesi vóru skipað og sett í verk á nøktandi hátt til at handfara váðan fyri týðandi feilum.<br><br>Vit eftirkannaðu fíggjarlig amboð (støði 1) í mun til kursin á keypsskálanum á við endan á roknskapar-degnum.<br><br>Vit eftirkannaðu uppgerðina av dagsvirðinum av fíggjarligum amboðum við stakroyndum.<br><br>Vit mettu um, hvørt uppgerðin av fíggjarligum amboðum var nøktandi og fullfíggjað. |

| *Megingrannskoðanarevni* | *Okkara reaktión meðan vit hava grannskoðað* |
|---|---|
| *Virðisáseting av avsetingum til eftirlønir*<br><br>Grunnurin hevur sett av 1.361 mió.kr. til eftirlønir, sum er 91% av fíggjarjavnanum tilsamans.<br><br>Eftirlønaravsetingar eru einans grundaðar á marknaðarrentu og verða tí uppgjørdar til dagsvirði samsvarandi virði á teimum ognum, sum eru knýttar at eftirlønunum.<br><br>Eftirlønaravsetingar hava metingaróvissur viðvíkjandi metingum av livitíð. Virðisásetingin av eftirlønaravsetingum verður tó bara grundað á marknaðarrentuproduktir, og verða tær tí virðisásettar til dagsvirði samsvarandi virði á teimum ognum, sum eru knýttar at eftirlønunum.<br><br>Virðisásetingin av ognunum, sum eru knýttar at eftirlønum, er ikki ávirkað av subjektiviteti og tí ikki tengt at metingaróvissu.<br><br>Vit hava lagt dent á virðisásetingina av avsetingum til eftirlønir, av tí at hesar eru týðandi í ársroknskapinum, og í ávísan mun ávirkaðar av roknskaparligum metingum, subjektiviteti og tí í ávísan mun tengdar at metingaróvissum.<br><br>Víst verður til ársroknskapin, "Avsetingar til eftirlønir til marknaðarrentu" í notu 9 og brotini í "Nýttur roknskaparháttur" "Íløguognir" og "Eftirlønaravsetingar". | Vit hava gjørt váðametingararbeiði við tí endamáli at fáa fatan av KT-skipanum, mannagongdum og eftirlitunum viðvíkjandi avsetingum til eftirlønir. Viðvíkjandi innaneftirlitunum mettu vit um, hvørt hesi vóru skipað og sett í verk á nøktandi hátt til at handfara váðan fyri týðandi feilum.<br><br>Vit hava brúkt okkara egnu serfrøði í metingini av aktuarhættum og myndlum, sum felagið hevur brúkt, og eisini viðvíkjandi brúktu fortreytunum og útrokningunum, sum eru gjørdar.<br><br>Vit mettu um og eftirkannað arbeiðshættir og myndlar eins og tær týdningarmestu fyritreytirnar, sum eru brúktar, grundað á okkara royndir og kunnleika til vinnugreinirnar, við tí fyri eyga at tryggja, at tær eru í samsvari við reglur og roknskaparkrøv. Hetta fevndi um eina meting av kontinuitetinum í grundarlagnum fyri útrokningini av avsetingum til eftirlønir.<br><br>Vit eftirkannaðu útrokningarnar av avsetingum til eftirlønir.<br><br>Vit mettu um, hvørt tað, sum er við í avsetingum til eftirlønir var nøktandi. |

**Ábyrgd leiðslunnar av ársroknskapinum**
Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera ein ársroknskap, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við føroysku tryggingarlóggávuna. Leiðslan hevur harumframt ábyrgdina av tí innanhýsis eftirliti, ið leiðslan metir skal til fyri, at ársroknskapurin kann gerast uttan týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum.

Tá ársroknskapurin verður gjørdur, hevur leiðslan ábyrgdina av at meta, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum; at upplýsa um viðurskifti viðvíkjandi framhaldandi rakstri, har tað er viðkomandi; umframt at gera ársroknskapin eftir roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, uttan so at leiðslan hevur í hyggju at avtaka felagið, steðga rakstrinum, ella at leiðslan í roynd veru ikki hevur annan møguleika enn at gera tað.

**Ábyrgd grannskoðarans fyri at grannskoða ársroknskapin**
Okkara endamál er at fáa grundaða vissu fyri, at ársroknskapurin í síni heild ikki hevur týðandi skeivleikar, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum og at geva eina grannskoðanarátekning við eini niðurstøðu. Grundað vissu er vissa við høgum stigi, men er ikki full trygd fyri, at ein grannskoðan, sum verður gjørd eftir ásetingunum í altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum eru galdandi í Føroyum, altíð kann avdúka týðandi skeivleikar, tá slíkir eru. Skeivleikar kunnu koma fyri orsakað av sviki ella mistøkum og kunnu metast at vera týðandi, um tað kann væntast, at teir hvør sær ella saman ávirka fíggjarligu avgerðirnar, sum roknskaparbrúkararnir taka við støði í ársroknskapinum.

Sum ein liður í grannskoðanini, ið verður gjørd eftir altjóða standardum um grannskoðan og øðrum ásetingum, sum er galdandi í Føroyum, gera vit yrkisligar metingar og hava eitt yrkisligt ivingarsemi undir grannskoðanini, har vit eisini:

- Eyðmerkja og meta um váðar fyri týðandi skeivleikum í ársroknskapinum, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, leggja til rættis og gera tey grannskoðanararbeiðir, sum hesir váðar krevja umframt fáa til vega tey grannskoðanarprógv, sum eru nøktandi at vera grundarlag undir okkara niðurstøðu. Váðin fyri ikki at varnast týðandi skeivleikar, sum standast av sviki, er størri, enn tá talan er um týðandi skeivleikar, sum standast av mistøkum, tí svik kann vera av samanløgdum ráðum, skjalafalsan, tilætlaðari burturúrlegging, villleiðingum ella við at skúgva innanhýsis eftirlitið til viks.

- Fáa eina fatan av innanhýsis eftirlitinum, sum er viðkomandi fyri grannskoðanina, fyri at kunna leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum, men ikki fyri at kunna gera eina niðurstøðu um dygdina á innanhýsis eftirlitinum.

- Taka støðu til, um roknskaparhátturin, sum leiðslan nýtir, er hóskandi, og um tær roknskaparligu metingarnar og tilhoyrandi upplýsingar, sum leiðslan hevur gjørt, eru rímiligar.
- Taka støðu til, um tað er rímiligt, at leiðslan hevur gjørt ársroknskapin við støði í roknskaparmeginregluni um framhaldandi rakstur, umframt um tað við støði í teimum grannskoðanarprógvum, sum eru fingin til vega, er týðandi óvissa um hendingar og viðurskifti, sum kunnu viðføra týðandi iva, um felagið megnar at halda fram við rakstrinum. Um okkara niðurstøða er, at tað er ein týðandi óvissa, skulu vit í okkara grannskoðanarátekning vísa á upplýsingar um hesi viðurskifti í ársroknskapinum ella, um hesar upplýsingar ikki eru nøktandi, tillaga okkara niðurstøðu. Okkara niðurstøður byggja á tey grannskoðanarprógv, sum vit hava fingið fram til dagfestingina á okkara grannskoðanarátekning. Hendingar og viðurskifti í framtíðini kunnu tó føra við sær, at felagið ikki longur megnar at halda fram við rakstrinum.
- Taka støðu til samlaðu framløguna, bygnaðin og innihaldið í ársroknskapinum, eisini upplýsingarnar í notunum, og um ársroknskapurin vísir tey grundleggjandi handilsviðurskifti og hendingar á ein slíkan hátt, at ein rættvísandi mynd fæst.

Vit samskifta við leiðsluna um millum annað vavið á ætlaðu grannskoðanini og nær grannskoðað verður og eisini um týðandi avdúkingar, herundir um týðandi manglar í innanhýsis eftirlitinum, sum vit hava eyðmerkt undir grannskoðanini.

Vit hava eisini veitt teimum, ið varða av leiðsluni eina váttan um, at vit hava livað upp til viðkomandi etisku krøvini um óheftni, og kunnað tey um øll sambond og onnur viðurskifti, ið rímiliga kunnu hugsast at ávirka okkara óheftni, og har tað er viðkomandi, kunnað um. hvat er gjørt fyri at taka burtur hóttanir, ella um verndartiltøk, ið sett eru í verk.

Ímillum tey evni, ið vit hava kunnað tey, ið varða av leiðslu um, meta vit um hvørji evni eru mest týðandi í sambandi við grannskoðanina av ársroknskapinum fyri inniverandi tíðarskeið, og tí verða mett sum megingrannskoðanarevni. Vit lýsa hesi evni í okkara grannskoðanarátekning uttan so, at lóg ella reglur forða fyri almannakunngerð, ella tá, undir sera sjáldsamum umstøðum, vit meta, at hesi evni skulu ikki vera lýst í okkara átekning, orsakað av, at tær óhepnu fylgjur, tað kann hava, viga tyngri enn áhugin hjá almenninginum í at fáa hesar upplýsingar.

**Ummæli av leiðslufrágreiðingini**

Leiðslan hevur ábyrgdina av leiðslufrágreiðingini.

Okkara niðurstøða um ársroknskapin fevnir ikki um leiðslufrágreiðingina, og vit geva onga niðurstøðu við vissu um leiðslufrágreiðingina.

Í sambandi við okkara grannskoðan av ársroknskapinum, er tað okkara ábyrgd at lesa leiðslufrágreiðingina, og í hesum sambandi at umhugsa um leiðslufrágreiðingin er í týðandi ósamsvari við ársroknskapin ella ta vitan, ið vit hava fingið undir grannskoðanini, ella á annan hátt tykist at hava týðandi skeivleikar.

Okkara ábyrgd er eisini at umhugsa, um kravdu upplýsingarnar eftir føroysku tryggingarlóggávuni eru umrøddar í leiðslufrágreiðingini.

Við støði í gjørda arbeiðinum er tað okkara fatan, at leiðslufrágreiðingin er í samsvari við ársroknskapin, og at hon er gjørd eftir ásetingunum í føroysku tryggingarlóggávuni. Vit eru ikki vorðin varug við týðandi skeivar upplýsingar í leiðslufrágreiðingini.

Tórshavn, tann 11. mars 2024

**P/F JANUAR**

løggilt grannskoðanarvirki

John Michal Petersen
statsaut. revisor

# Rakstrarroknskapur

| Nota | | 2023<br>t.DKK | 2022<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| 2 | **Eftirlønargjøld** | **101.956** | **96.500** |
| 3 | Rentuinntøkur og vinningsbýti v.m. | 21.823 | 23.154 |
| 4 | Virðisjavningar | 106.301 | -215.147 |
| | Rentuútreiðslur | -764 | -553 |
| | Fyrisitingarkostnaðir av íløguvirksemi | -1.331 | -1.944 |
| | **Úrslit av íløguvirksemi í alt** | **126.029** | **-194.490** |
| 5 | **Útgoldin eftirløn** | **-32.036** | **-30.900** |
| | Broyting í limakontum | -10.660 | 10.813 |
| | Broyting í eftirlønaravsetingum | -177.805 | 120.028 |
| | **Broyting í eftirlønaravsetingum netto** | **-188.465** | **130.841** |
| 6 | Fyrisitingarkostnaðir | -5.745 | -4.973 |
| | **Rakstrarkostnaðir av eftirlønarvirksemi í alt** | **-5.745** | **-4.973** |
| | Flutt úrslit av íløguvirksemi | -1.787 | 3.284 |
| | **EFTIRLØNARTEKNISKT ÚRSLIT** | **-48** | **262** |
| | Íløguúrslit av eginognini | 1.787 | -3.284 |
| | **ÚRSLIT AV RAKSTRI** | **1.739** | **-3.022** |

# Fíggjarstøða

| Nota | | 31.12.2023 t.DKK | 31.12.2022 t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **OGN** | | |
| | Rakstrartól | 36 | 0 |
| | Lánsbrøv | 484.291 | 413.363 |
| | Íløguprógv | 949.776 | 833.024 |
| | Partabrøv | 6.751 | 0 |
| | Útlán | 1.370 | 1.500 |
| | Innlán | 44.736 | 48.917 |
| 10 | **Aðrar fíggjarligar íløguognir tilsamans** | **1.486.925** | **1.296.804** |
| 10 | **ÍLØGUOGN ÍALT, TENGD AT EGINOGNINI** | **31.456** | **29.717** |
| 10 | **ÍLØGUOGN TENGD AT MARKNAÐARRENTUPRODUKTUM Í ALT** | **1.455.469** | **1.267.087** |
| | Onnur áogn | 0 | 230 |
| | **ÁOGN TILSAMANS** | **0** | **230** |
| | Rentur til góðar | 3.820 | 2.770 |
| | **TÍÐARAVMARKINGAR Í ALT** | **3.820** | **2.770** |
| | **OGN Í ALT** | **1.490.780** | **1.299.804** |

# Fíggjarstøða

| Nota | | 31.12.2023<br>t.DKK | 31.12.2022<br>t.DKK |
|---|---|---|---|
| | **SKYLDUR** | | |
| | Innskot | 13.421 | 13.421 |
| | Framflutt úrslit | 18.035 | 16.296 |
| | **EGINOGN Í ALT** | **31.456** | **29.717** |
| 7 | Innskot frá limunum (limakontur) | 97.357 | 86.697 |
| | **ÁBYRGDARLÁN Í ALT** | **97.357** | **86.697** |
| 8 | Avsetingar til eftirlønir til marknaðarrentu | 1.361.047 | 1.183.242 |
| | **AVSETINGAR TIL EFTIRLØNIR Í ALT** | **1.361.047** | **1.183.242** |
| | Onnur skuld (stuttfreistað) | 920 | 148 |
| | **SKULD Í ALT** | **920** | **148** |
| | **SKYLDUR Í ALT** | **1.490.780** | **1.299.804** |

9 Trygdir og eventualskyldur
10 Útgreining av fíggjarognum og avkasti
11 Váðastýring og viðkvæmisupplýsingar
12 Nærstandandi partar

LÍVSVERK
EFTIRLØNARGRUNNUR LØNTAKARANNA

# Frágreiðing um eginogn

| | 31.12.2023<br>t.DKK | 31.12.2022<br>t.DKK |
|---|---|---|
| **Eginogn** | | |
| Innskot við ársbyrjan | 13.421 | 13.421 |
| **Innskot við ársenda** | **13.421** | **13.421** |
| | | |
| Flutt úrslit við ársbyrjan | 16.296 | 19.319 |
| Flutt frá rakstri | 1.739 | -3.022 |
| **Flutt úrslit við ársenda** | **18.035** | **16.296** |
| | | |
| **Eginogn við ársenda** | **31.456** | **29.717** |
| | | |
| **Grundarfæfeingi og fæfeingiskrav** | | |
| Eginogn | 31.456 | 29.717 |
| Limakontur | 97.357 | 86.697 |
| **Kjarnufæfeingi** | **128.813** | **116.414** |
| | | |
| Grundarfæfeingi | 128.813 | 116.414 |
| Fæfeingiskrav | 27.591 | 27.515 |
| **Grundarfæfeingi til avlops** | **101.222** | **88.899** |